Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um nevnd at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m.
(Samsýningar og eftirløn løgtingsmanna o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 77 frá 6. mai 2003 um nevnd at geva løgmanni tilmæli um samsýningar og eftirløn landsstýrismanna v.m. verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"Løgtingslóg
um
nevnd at geva tilmæli um samsýningar og eftirløn o.a. til landsstýrisfólk og løgtingsfólk"

2. Í § 1 og § 2, stk. 1 verður "landsstýrismanna v.m." broytt til: "o.a. til landsstýrisfólk."

3. § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Nevndin verður vald, tá ið løgmaður í samráð við løgtingsformannin metir, at tørvur er á at seta nevndina."

4. § 4, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Nevndin skal lata løgmanni tað í grein 2 nevnda tilmælið í seinasta lagi eitt ár eftir, at hon er sett."

5. Aftaná § 4 verður sett:
"§ 4 a. Samsvarandi ásetingunum í §§ 1-4 skal nevndin somuleiðis geva løgtingsformanninum tilmæli um samsýningar og eftirløn o.a. til løgtingsfólk.
Stk. 2. Løgtingsformaðurin almannakunnger tilmælið."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi, tá ið nýtt løgting verður sett sambært § 9, stk. 2 í stýrisskipanarlógini eftir fyrst komandi løgtingsval.

Samtykt á Løgtingi hin 17. mai 2024 við 28-0-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 21. mai 2024

stjóri

LM-107/2023